TILTØK

Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum
Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Gøta
Ungdómsmøti verður í kirkjukjallaranum í kvøld kl. 20 við Frits Thomsen av Skála, øll eru hjartaliga vælkomin.

Sangmøtir á Svangaskarði
Hesi sangmøti verða á Svangaskarði um vikuskifti.
Fríggja- og leygardagin kl. 20 og sunnudagin kl. 18, við luttøku úr Sandoy, Streymoy og Eysturoy. Eisini verður felagssangur, Tormund v.fl. Øll hjartaliga vælkomin.

Missiónshúsið í Leirvík
Sunnudagin kl. 18 Møti v/ Torstein Johannesen, kl. 21 Ungdómsmøti.
Mikukvøldið kl. 20 Bíblutími.

Getsemane, Klaksvík
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli og kl. 18 Møti. Tú ert hjartaliga vælkomin.

Soli Deo Gloria
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Pól Jóhannes og Bodil Simonsen. Øll eru vælkomin.

Aglow, Klaksvík
Møti verður á Soli Deo Gloria leygarkvøldið 13. nov. kl. 20. Møti er fyri bæði kvinnur og menn.

KFUM & K, Klaksvík
Bønarløta verður hvørt kvøld hesa vikuna kl. 19.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarmøti, kl. 18 Møti við Jakku Mýru, kl. 21 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Missiónsvikan verður í KFUM í komandi viku.
Mánakvøldið kl. 19.30 Jóannes Fonsdal, Lovsangsbólkurin syngur.
Týskvøldið kl. 19.30 Regin Høgnesen, Tórhild Bjarkhamar syngur.

Betesda, Norðoyggjar
Sunnudag kl. 11 Minnismáltíð Harrans,
kl. 12.30 Sunnudagsskúli,
kl. 18 Evangel. fundur.
Mánadag kl. 20 Bønarfundur.
Mikudag kl. 20 Uppbyggingarfundur.
Hósdag kl. 21 Ungdómsfundur.

Norðoyggjar Evnisdagur um Ísrael
Leygardagin 13. november skipar Ísraelsmissiónin fyri evnisdegi um Ísrael og missión í KFUM og K í Klaksvík. Aðalskrivarin í Norsku Ísraelsmissiónini, Rolf G. Heitman kemur at tala.
Skráin sær soleiðis út:
kl. 14 Ísrael og kirkjan – tvey gudsfólk? kl. 15 Kaffi/te, kl. 15.30 Nýtt úr Ísrael, kl. 16 Evangeliið fyri jøda fyrst (Róm 1.16), kl. 17 Liðugt.

Viðareiði
Sunnukvøldið kl. 18 Møti í Missiónshúsinum v/ Ólavur í Mittúni. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Missiónshúsið í Skopun
Í samband við at Missiónshúsið verður 50 ár 14. nov. verða hesi møtir í Samljóð: Leygarkvøldið kl. 20 Møti v/Árna Kjærbæk, Ebba, Nimrod og fleiri syngja. Innsvnan.
Sunnudagin kl. 15 Familjumøti í Missiónshúsinum v/ fam. Fonsdal, kl. 18 Føðingardagshald í Samljóð, ymiskar kreftir luttaka. Øll hjartaliga vælkomin.

Missiónshúsið á Tvøroyri
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Hjartvard Thomsen og Ednu Bech. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Innsavnan verður til húsið. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Sion, Vágur
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Møti.
Mánakvøldið kl. 21 Bønarmøti og bønartænasta á tlf. 373777. Tú ert vælkomin at ringja um tær tørvar forbøn.

Frelsunarherurin í Vági
Leygardagin kl. 20 Evangel. møti v/ Toril og Niels E. Olsen.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarmøti, kl. 18 Evangel. møti v/ Toril og Niels E. Olsen.

Aglow, Suðuroy
Fundur verður á Tvøroyri leygarkvøldið kl. 20 í Café One Way. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

Bønhúsið í Øravík
Junior-arbeiði verður leygarkvøldið kl. 20. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Missiónshúsið í Sumba
Møti verður sunnukvøldið kl. 18 v/ Sigrid Ludvig. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Møti í Føroyahúsinum í DK
Fríggjakvøldið 19. nov. kl. 19.30 hevur Kristnastova møti í Føroyahúsinum. Rúni Olsen talar. Vitnisburður, drama og góður og lættur felagssangur. Økeypis te/kaffi og køkur. Ver vælkomin.
NB: Hetta kvøldið er einki fríggjadagsmøti í Kristnastovu á Brimavej 36, Amager, men ístaðin í Føroyahúsinum kl. 20.30.

Evangel. fundir í DK Samkoman Malta
Leygarkvøldið kl. 19 verður Evangel. fundur í Skolehjemmet, Søndarlandevej 28, Sønderborg. Sunnumorgunin kl. 10 bróta vit breyð á somu adr.
Sunnukvøldið kl. 17 Evangel. fundur í Standgårdsgade 4, Vejle. Talarar: Símun av Thorkilsheyggi, Símun Fuglø og onnur. Eftir fundirnar bjóða vit kaffi. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Ørkin, Reykjavík
Møti hvørt sunnukvøld kl. 20.30. Aftaná er kaffi.

Tilhaldið
í Tórsgøtu 21, tlf. 316491
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.

Mánadagin 15. november
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10-17 Vit hugsa um jólini
kl. 14-17 Kortspæl, telving, landastrok, bobbspæl, dart og onnur spøl. Møguleiki er at koma sum gestur til døgurðan miku- og fríggjadagin. Tilm. tlf. 316491
kl. 14-17 Havnaprát, Birgar Fridtleif Johannesen.
Komandi mánadagar kemur Birgar at vitja Tilhaldið, at kunna seg meira um Havnina
Týsdagin 16. november
kl. 10.00–11.30: Vit syngja. Jóhan R. Jacobsen.
kl. 15.00: **Hugleiðingar um kvinnur í Havnini fyrru helvt av 1900 talinum**, Suni F. Jacobsen
Mikudagin 17. november
kl. 10.00–13.00: Matgerð. Anne Grethe Harlou
kl. 12.00: Døgurði
kl. 15.00 **Við bussiúr Steinatúni niðan á Ternurygg, ganga eftir gøtum út á Ringvegin. Oman aftur við bussi.**
kl. 17.00–21.00: Opið hús
Hósdagin 18. november
kl. 10.00–10.30: Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 11.00–11.45: Eingilskt talaprát, Ásmundur Johannesen
kl. 14.00–17.00: Telduprát, Brandur Petersen
kl. 14.00–16.00: Boccia í kjallaranum
Fríggjadagin 19. november
kl. 10.00–13.00: Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12.00: Døgurði
kl. 13.00–17.00: Opið hús.

Tað er altið ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Felagið Tórshavn
Farið verður til sjónleikin Elling og Kjell Bjarne týskvøldið 12. november kl. 20.00. Tilmelding.

Kunningarstovan í Vági
Marknaðardagur fyri **brúkt ting** á Polarfrost í Vági leygardagin 13. nov. kl. 10-18.
Dansur og mótasýning við brúktum klæðum kl. 14.
Grindabátarnir selja kaffi og køkur.
Kom og rudda! Nú fært tú høvi til at sleppa av við alt tað, sum tú eigur, men ikki hevur brúk fyri longur.
Tú hevur møguleika fyri at: Selja tingini, býta um við onkran ella at geva tingini burtur. Tey, sum ynskja at selja okkurt, mugu boða frá luttøku, soleiðis at tey kunnu fáa eitt borð at standa við og seta sína ting á.
Meiri fæst at vita á Kunningarstovuni í Vági tlf. 374342/284342.

Eldrahugni á Tvøroyri
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *ólikaviku* frá kl 15.00 til 18.00. Bílur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.

Tilhaldið Hugnin í Sandoy
er opið mánadag og mikudag frá kl. 14 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Bløðini eru eisini til taks. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Dagtilhaldið Fløvi
– í kvinnufelagshúsinum á Glyvrum. Tlf. 448279. Allir pensionistar eru hjartaliga vælkomnir. Opið mánadag til fríggjadag kl. 15-18.
Mánadagin 15. november
Fimleikur v/ Jóhannu Troest
Týsdagin 16. november:
Vit spæla Boccia
Mikudagin 17. november:
Vit gera bomm
Hósdagin 18. november:
Myndaveving fyri áhugað v/ Rannvu Gøte.
Fríggjadagin 19. november:
OPIÐ HÚS. Kaffi, te og pannukøkur.

Hvønn dag ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altið til taks. Somuleiðis kort og spøl. Tú ert vælkomin at hava títt egna handarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.

Evangeliska Røddin, Odense
Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

Ørkin í Reykjavík
Møti hvørt sunnukvøldið kl. 20.30.

Malta, Hirtshals
Sunnudag: Kl. 11: Breyðbrótting. Kl. 18: Evangeliskur fundur. Mikukvøld kl. 20: Bønar- og uppbyggingarmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møti. Eftir fundirnar bjóða vit ein drekkamunn.

Eliaskirkjan
Møti er hvørt leygarkvøldið kl. 19 í kjallaranum í Eliaskirkjuni á Vesterbro Torv, Vesterbrogade 49. Inngongd undir stóru trappuni. 5 min. at ganga frá Hovedbanegården, 2 min. frá Føroyahúsinum. Bussarnir 1, 6, 14, 16, 28 og 550S steðga nærhendis.
Sunnudagsskúli er í Eliaskirkjuni hvønn sunnudag kl. 14 í kjallaranum og kl. 11 í barnarúminum á Oyrasundskollegiinum, Dalslandsgade 8 á Amager. Øll eru vælkomin.
Nærri fæst at vita frá Atla Rasmussen, tlf. 32969995 ella Róa Rasmussen tlf. 32886480.
E-mail: ek_fo@get2net.dk

Dagtilhaldið í Vági
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

Vágs Pensionistafelag
Vágs Pensionistafelag – felagið fyri pensionistar í Suðuroyar sunnaru helvt – hevur limafund kl. 19.00 hvønn seinasta mánadag í hvørjum mánaða. Ymiskt áhugavert er á hvørjum fundi, har tú eisini fært drekkamunn við bollum og køkum. Fundirnir verða hildnir í hugnaligu hølunum hjá Vágs Matmoðrafelag.
Allir pensionistar og øll oman fyri 60 ár eru vælkomin.
Gerst limur í Vágs pensionistafelag.

Spælistovan í meinigheitshúsinum
er opin mána-, týs- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh.
tlf. 319630/61 655400.

AA-fundir í Havn
Tinghúsvegur 37
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.00 Stóri bókafundur
Mikudag: kl. 20.00–21.00 Stiga- og siðafundur
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: Opin fundur kl. 09-10, kl. 17.00–18.00 og kl. 22.30-23.30
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

Føroya Heimavirkisfelag
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

NA (Anomymir narkomanar)
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

Al-Anon
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt hóskvøld kl. 20 og sunnudag kl. 17. Síðsta sunnudag í mánaðinum er opin speakarafundur í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.

AA-fundur í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

AA-fundir í Vágum
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld kl. 19.00 og sunnudag kl. 16.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

Al-Anon í Vágum
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

AA í Vági
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

AA-Suðuroy
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

Blái Krossur – Glyvrar
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

Blái Krossur – Eiði
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

Fyribyrgingarráðið
Argjaboðagøta 7 · 160 Argir
postrúm 135 · 110 Tórshavn
tlf. 315155 · fax 320272
Teldupostadr.:
fyribyrg@fyribyrg.fo
heimasíða: fyribyrg.fo

Náttarravnarnir í Tórshavn
Tin stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr.
Ringið: Ella 316261, Tone 261165, Hans Jákup 778170, Guðrið 314607. Arni 222552

Lymfødemfelagið
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

Heilafelagið
Íslandsvegur 10 · tlf. 317373
T-post: heilaf@post.olivant.fo
Nærri upplýsingar, eisini við ráðgeving, finst á heimasíðuni: www.mbf.fo undir »Um MBF«.

Parkinsonfelagið
MBF-húsið, Íslandsvegur 10C
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið hjá Kristinu, tlf. 317317.

Føroyskir fiskimenn uttanlands
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svoríki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894.
Fø. Sparikassi 442027-8.

Føroyskir Mærsk Siglarar
Grønlandsvegur 58, 100 Tórshavn
Frítíðarfelag, hvørs endamál er at røkja áhugamál hjá teimum føroyingum, ið starvast hjá A. P. Møller – Mærsk A/S. Tilmeldingarskjal fæst við at venda sær til felagið á tlf. 590100 ella um teldupost: aldebaran@kallnet.fo

Javni
Hoydalsvegur 40 · 3 hædd
Vit hava eisini eina heimasíðu: www.javni.fo og t-post adressu: javni@post.olivant.fo har tit altið eru vælkomin at senda spurningar ella viðmerkingar.

Kvinnuhúsið
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

Føroya Astma/Allergifelag
MBF-húsið, Íslandsvegur 10c, Tlf./fax 311419.
Upplatingartíðirnar eru: hvønn hósdag kl. 16.30-18.

Deyvafelag Føroya
Íslandsvegur 10B
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 317597,
fartlf. 222381,
skrivitlf. 316929 · fax 313609
og teldupostadr. deaf@deaf.fo
heimasíðan: www.deaf.fo

MBF – Meginfelag teirra brekaðu
Íslandsvegur 10c
FO-100 Tórshavn · tlf. 317373

Skjalasavnsdagur 2004:

"Skjalarannsóknir og arbeiðshættir: Um brúk av Landsskjalasavninum"

Hevur tú nakrantíð havt hug at granska eitthvørt søguligt, verið tað seg um ætt tína, um eina ávísa hending, eitt ávíst tíðarskeið, eina rørslu o.s.fr.?

Hevur tú nakrantíð ivast í, hvussu ein kann byrja gransking av skjølum?

Hevur tú nakrantíð undrast á, hvat ein ger fyri at varðveita skjøl, hvussu tey verða goymd o.s.fr.?

Hevur tú nakrantíð havt hug at síggja søgulig skjøl og fingið eitt sindur av innlit í, hvussu fólk hava liva?

Um ja, so er skjalasavnsdagurin nakað fyri teg!

Leygardagin 13. november kl. 14.00 byrjar tað árliga afturvendandi tiltakið hjá Landsskjalasavninum: "Arkivernes dag". Hetta er partur av einum norðurlendskum tiltaki, har skjalasøvn í hesum londum lata upp dyrnar inn á sjálvar goymslunar. Endamálið er at geva almenninginum at betur innlit í skjalasavnsarbeiði. Viðmerkjast skal, at fólk til eina og hvørja tíð hava høvi at síggja og nýta skjøl úr goymsluni. Tó er tað serliga við Skjalasavnsdegnum, at fólk fáa møguleika at koma heilt inn á goymslurnar. Í høvuðsheitum kann sigast, at endamálið við Skjalasavnsdegnum er at:

- Vekja áhuga fyri skjalasøvnum
- At kunna um innihaldið í tilfarinum á Landsskjalasavninum
- At greiða frá arbeiðinum hjá Landsskjalasavninum og leiklutin sum mentunarstovnur
- At seta í brennidepilin skjalasøvnini sum mentunarligt og demokratiskt tilfeingi

Í ár hevur Landsskjalasavnið valt sum ein spennandi tátt at lýsa skjalasavnsarbeiðið við at nýta eitt ítøkiligt og aktuelt dømi. Talan er fyrst um eina framlogu um arbeiðið við at savna tilfar til bókina hjá Justinusi Eidesgaard, Kaj: Ein dokumentarisk ævisøga. Justinus hevur vitjað nógv á Landsskjalasavninum síðsta árið, og sjálvur sigur hann, at savnið hevur havt ein sera týðandi leiklut í bókini hjá sær. So talan er í royndir og veru um at lýsa granskingarprosessina, ið liggur aftanfyri, at hendan bókin er vorðin veruleiki.

Frá at verða ein púra óroyndur nýtari av Landsskjalasavninum hevur Justinus lært nógv um ymsu søvnini og sambondini teirra millum. Samstundis hevur hann fingið innlit í gransking og arbeiðshættir á Landsskjalasavninum. Framløga hansara greiðir frá, hvussu ein kann byrja sum óroyndur granskari í skjalasøvnum og koma at kenna og fáa innlit í ymsu grunnanar á Landsskjalasavninum. Somuleiðis verður tosað um, hvussu starvsfólkini á skjalasavninum kunnu vegleiða við teirra hollu vitan um skjøl og eldri skriftir.

Sjálv goymslan og lesistovan lata dyrnar upp kl. 14.00. Síðani verður framløgan hjá Justinus Eidesgaard kl. 15.00 á Føroyamálsdeildini (Debesartrøð í Tórshavn). Farið verður síðan yvirum vegin til goymsluna hjá Landsskjalasavninum, har høvi verður at vitja inni á goymsluni og fáa kaffi. Á goymsluni eru eisini nógv av skjølunum, ið brúkt vórðu til bókina hjá Justinus løgd fram til vitjandi at síggja. Samstundis eru starvsfólkini eisini tøk til at svara spurningum um ávís skjøl ella skjalasavnsarbeiðið sum heild.

P/F ALMA
Maskinverkstaður & Smiðja
CATERPILLAR
Entreprenørmaskinur við fígging

Á hjalla 15 · Boks 1338 · 110 Tórshavn · tel 31 58 90 · fax 31 04 68 · jan@alma.fo

Skeið innan góðskutrygging í byggivinnuni (kvalitetssikring)

VINNUHÚSIÐ
House of Industry

Føroya Byggifrøðingafelag og Føroya Handverksmeistarafelag skipa fyri skeiði innan góðskutrygging í byggivinnuni.

Skeiðið er ætlað projekterandi byggifrøðingum, arkitektum, verkfrøðingum o.ø., arbeiðstakarum, byggi- og entreprenørfeløgum, handverksmeistarum o.ø. og byggiharrum.

Skeiðið inniheldur m.a.:
- Arbeiðshættir frá byggiharra til útboð
- Góðskutryggingarreglur
- Uppskotsgransking
- Projektkontrol
- Útboðskontrolplan
- Stýrihættir
- Stýriætlan
- Eftirlit
- Góðskutryggingarskipanin
- Góðskutryggingarhondbókin
- Bólkaarbeiði

Útgreinað skeiðsyvirlit kann heintast/síggjast á heimasíðuni – www.industry.fo

Undirvísarar
Undirvísarar á skeiðnum verða frá Vitus Bering Danmark.

Skeiðsstaður og kostnaður
Skeiðið verður á Hotel Føroyum tann 18. og 19. november 2004.
Kostnaðurin fyri at luttaka er kr. 3000,- fyri hvønn íroknað mat og skeiðstilfar.

Skeiðsluttakarar kunnu bíleggja sær eitt kamar í sambandi við skeiðið fyri kr. 700,- íroknað morgunmat.

Tilmeldingarfreist
Freistin at tekna seg til skeiðið og at bíleggja kamar er 15. november 2004.

Tekning fer fram á www. industry.fo

R. C. Effersøesgøta 30, FO-100 Tórshavn, Tel 31 18 64, Fax 31 72 78, industry@industry.fo, www.industry.fo

HAVNAR BIO
Tlf. 31 19 56
www.bio.fo

Leygardagin 13.11.kl. 16[15]
Leygardagin 13.11.kl. 18[45]
Sunnudagin 14.11.kl. 16[00]
Sunnudagin 14.11.kl. 18[30]

Leygardagin 13.11.kl. 21[15]
Leygardagin 13.11.kl. 23[30]
Sunnudagin 14.11.kl. 21[00]
Sunnudagin 14.11.kl. 23[15]

Leygardagin 13.11.kl. 23[00]
Sunnudagin 14.11.kl. 22[15]



Leygardagin 13.11.kl. 20[00]
Sunnudagin 14.11.kl. 19[30]

P BIO KIOSKIN P
Heitt Pop-Corn - Coca Cola - Góðgætí - Fóm ís - o.m.a.